


*Synarchy spælir heavy-metal-tónleik*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# »Vit skera fólk í pettir«



*Tveir av teimum fimm limunum í Synarchy, Ísak Petersen og John Ívar Venned*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Í ár 2004 byrjaði bólkurin Synarchy at spæla thrash-metal-rock tónleik. Upprunaliga vóru teir tríggir, nú eru teir fimm, men bert ein er eftir í tí upprunaliga bólkinum**

TÓNLEIKUR
*Fía Niclasen*
*Jórunn Reginsdóttir*
*starvspraktikantar á Sosialinum*

Bert Ísak Petersen á bass er eftir í tí upprunaliga bólkinum, har John E. Láadal á guitar og Petur á trummum eisini vóru við tá.

So við og við bleiv bólkurin »útskiftur«. Umframt Ísak Petersen er bólkurin í dag mannaður við Leon B. Hanson, Bjartur F. Clementsen, John Ívar Venned og Kim Joensen.

- Vit spæla metal, tí tað sigur okkum mest, siga Ísak Petersen og John Ívar Venned. Og tá ið vit spyrja hvat tónleikateksturin snýr seg um, svara teir við einum stórum látri, »at skera fólk í pettir«, men leggja síðani afturat, at teksturin hjá teimum er um »alt og einki«.

Tveir av teimum fimm í bólkinum hava langt hár, sum so nógvir aðrir metal'arir eisini hava.

- Vit hugsa ikki so nógv um úsjónd okkara, vit fokusera bara uppá tónleikin, sigur John Ívar Venned. Teir hava nógvir bólkar sum fyrimynd, og ein av teimum er tann vælkendi, Soilwork.

## Droyma um Týskland

Tá Synarchy byrjaðu at spæla tónleik, spældu teir ikki serliga nógvar konsertir, men so við og við fingu teir fleiri høli at spæla í, og nú spæla teir rættiliga ofta. Sum oftast í náttklubbinum Cippo, sum øll kenna. Teir hava eisini ofta konsertir saman við bólkinum Ineptus, sum eisini er ein metalbólkur úr Havn. Av festivalum hava teir bara spælt á Asfalt, har teir vóru sera væl dámdir. Fólk tóku væl ímóti teimum og tónleiki teirra.

Vit spurdu, um teir hildu at teirra tónleik altíð verða so væl móttiknan sum á Asfalt, og tað hildu teir.

- Fólk, sum dáma hetta slagið av tónleiki, taka væl ímóti okkara tónleiki, sigur bassspælarin í Synarchy, Ísak Petersen og heldur áfram:

- Einaferð sá eg eitt gamalt par um tey 80, 'headbanga' til okkara tónleik, tað var rættiliga kul, sigur hann og flennur. So tað eru ikki bara ung, sum dáma Synarchy.

Vit spurdu eisini, um teir verða kendir aftur, tá ið teir ganga á gøtuni

- Tað hendir, at fólk kenna okkum aftur. Einaferð tá forsangarin, Leon B. Hanson, fór í býin fekk hann eina ókeypis pizza, tí onkur kendi hann aftur. Tað var sakin!

Dreymurin hjá limunum í Synarchy er at kunna liva av at gera tónleik, men teir halda seg ikki vera komnar nakað áleiðis við hesum dreymi, tí enn eru teir júst byrjaðir.

- Vit droyma um at koma at spæla á kenda týska heavy-metal-festivalinum, Wacken, har Iron Maiden er høvuðsnavnið í ár.

Næsta stigið hjá Synarchy er at geva eina fløgu út, ið teir júst nú eru í gongd við at innspæla. Fløgan kemur út fyrst í 2009. Navnið á fløguni er enn so loyniligt, at sjálvt ikki allir limirnir í bólkinum kenna tað enn.